Fyrilestrarrøð á Baresso:

# Íblástur til íverkse

**Tað var læruríkur hálvurannar tími fyri áhoyrararnar, ið høvdu leitað sær niðan í SMS hóskvøldið at lurta eftir fyrilestrum í sambandi við íverksetaraátakið, ið er húsunum í hesum døgum. Vinnumálaráðharrin, umboð fyri vinnufelagsskapir og vinnuna greiddu áhoyrarunum frá, hvat skal til fyri at seta á stovn egið virki**

ÍVERKSETAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jan Mortensen frá Vinnuhúsinum og Rani Nolsøe frá Íverksetarahúsinum í Klaksvík hildu hvør sín fyrisetur*

Rættiliga fitt av fólki hevði leitað sær upp í kaffibarrina Baresso hóskvøldið, har fleiri áhugaverdir fyrilestrar vóru á skránni.

Nokk so passandi var tað landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, sum legði fyri.

Síðani greiddi Kitty May Ellefsen frá íverksetaradøgunum meiri generelt, áðrenn umboðini fyri vinnuna fingu orðið.

Fyrst av hesum var Guðrun Rógvadóttir frá sniðgevarafyritøkun i Guðrun og Guðrun. Hon greiddi frá, hvørjar trupulleikar tær mátti dragast við, tá tær byrjaðu fyri seks árum síðani. Tær byrjaðu í tí smáa, og máttu gjøgnum eina rúgvu av forðingum, áðrenn tær komu hartil, sum tær eru í dag.

Guðrun vísti á tað gleðiliga í, at tað tykist, sum um ungdómurin í dag er komin eitt fet víðari enn tær vóru fyri seks árum síðani.

Eg var komin á universitetið, áðrenn eg helt meg framat at tosa í almennum høpi. Tí var tað gleðiligt at síggja tey ungu í dag leggja fram teirra virkisætlanir á palli púra frítt. Og tá eg spurdi: Hvat nú, um tit skuldu presentera tykkara framleiðslur á enskum, var svarið: No problem. Og tað er flott, segði Guðrun Rógvadóttir.

Kendi sniðgevarin vísti á, at tað er neyðugt hjá fyritøkunum at ávirka karmarnar soleiðis, at karmarnir laga seg til fyritøkurnar og ikki øvugt. Hon helt eisini – og tað vísti samansetingin av luttakandi bólkunum í Ungt Virki eisini – at kvinnur enn í alt ov stóran mun halda seg aftur, og heldur enn at bjóða seg fram skumpa í hesum førunum dreingirnar fram.

Sum dømi nevndi hon, at bert ein av teimum 18 luttakandi bólkunum var reint kvinnuligur. Hinvegin helt hon, at tað var positivt, at føroyingar eisini hugdu at øðrum enn fiski.

### framtak.fo stuðlar stórum og smáum

Gloria Kalsø er forkvinna í framtak.fo, tað, ið áður nevndist Framtaksgrunnurin. Hon gav eina sera áhugaverda frágreiðing um, hvussu framtak.fo virkar og stuðlar.

Í stuttum kann sigast, at grunnurin sum íleggingargrunnur ger íløgur í vinnuna, antin sum partapðening ella sum lán, og síðani, tá viðkomandi virki hvílir á einum tryggum grundarlagi og ber seg, selur grunnurin síni partabrøv fyri síðani at nýta vinningin – og uppruna partapeningin – til íløgur í aðrar fyritøkur.

Talan kann vera um nýggjar fyritøkur ella fyritøkur, ið vilja royna nýggjar leiðir, og nýtast kapitalhækking til tess at menna felagið til ávís átøk.

Eitt aðalendamál hjá grunninum er at menna og fjøltátta viknnulívið til gagns fyri samfelagið.

Framtak.fo kann tó bert vera minnilutaeigari í fyritøkunum, men fáa nevndarlim, sum ety royna at velja á ein slíkan hátt, at viðkolmandi kann tilføra fyritøkuni vitan alt eftir, hvør fyritøkan er.

Gloria Kalsø upplýsti, at grunnurin setur partapening ella veitir lán til stórar eins væl og smáar fyritøkur. Størsta íløgan er í Smyril Line, har framtak.fo eigur um triðing av partapeninginum – beint omanfyri 70 mió. kr. – og minsta liggur um 300-400.000 kr.

Hon upplýsti eisini, at umsøkjarin má duga at selja seg til grunnin, eitt nú við neyvari frágreiðing um verkætlanina, bæði fíggjarliga og praktiskt.

### Vinnufeløg hjálpa

Jan Mortensen frá Vinnuhúsinum og Rani Nolsøe frá Íverksetarahúsinum í Klaksvík hildu eisini fyrilestrar, Jan um hvussu Vinnuhúsið kundi vera til hjálpar hjá íverksetarum, og Rani hvussu nýggja Íverksetarahúsið í Klaksvík higartil hevur virkað.

Jan Mortensen greiddi frá, at Vinnuhúsið í mestan mun kann vera til hjálpar í praktiskum spurningum, eitt nú viðvíkjandi sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum og dagligum forðingum sum avgreiðslu á Toll- og Skatt ella góðkenning av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Vanliga skal ein fyritøka vera limur í Vinnuhúsinum fyri at njóta ágóðan, ið hetta hús kann bjóða, men sum ein serlig hjálp til nýstovnaðar fyritøkur stendur teimum í boði at vera limir ókeypis, og harvið at kunna njóta teir fyrimunir, ein slíkur limaskapur gevur. Eitt nú á teimum mongu ymisku

---




Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri:

# Birta uppundir nýskapan og í

**Í vinnupolitikkinum verður sagt frá, at ætlanin er at leggja saman Ferðaráðið og Menningarstovuna, og hetta er nú veruleiki. Ein av høvuðsuppgávunum hjá stovninum verður at birta uppundir nýskapan og íverksetan, segði vinnumálaráðharrin**

*Bjarni Djurholm var millum fyrilestrarhaldararnar*
*Mynd: Erla Torvadal*

ÍVERKSETAN
*Erla Torvadal*
*redaktion@sosialurin.fo*

Bjarni Djuurholm greiddi frá, hvussu tað er at seta eitt virki á stovn.

Hann legði stóran dent á, at vit skulu stuðla hvørjum øðrum, og eisini gera okkum greitt, at vegurin til eitt nýtt virki er langur og drúgvur. Tó skulu vit læra at halda forðingum longst burtur sum møguligt. At seta virki á stovn í einum so lítlum samfelagi er ein stór tak, og eisini greiddi hann frá, hvussu vit halda vansunum butur sum best.

Bjarni Djurrholm segði millum annað: »Vit hava kreativt fólk, og skulu føroyingar gerst góðir íverksetarar, mugu forðingar beinast burtur.«